

# Móttøka fyri Magnusi

Í samband við at Magnus á Stongum, ið hevur røkt starvið sum kommunulækni í Eiðis læknadømi í 22 ár, hevur sagt seg úr starvinum, verður skipað fyri almennari móttøku á Hotel Eiði fríggjadagin 31. Oktober frá klokkan 16 til 19. Tað eru Eiðis-, Funning- og Sunda kommunur, ið skipa fyri móttøkuni fyri fráfarandi kommunulæknanum.

# Psykiatri fyri børn og ung skal mennast

**- Vit hava arbeitt við at menna heildarpsykiatriina seinastu árini í Føroyum. Sosial- og økispsykiatriin eru ótrúliga nógv mentar, og nú stendur barna- og ungdómspsykiatriin fyri tørni, sigur landsstýrismaðurin við heilsumálum, Hans Pauli Strøm, í viðmerking til greinar í Sosialinum í gjár**

SJÚKRAVIÐGERÐ

*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Sálarfrøði sum læknavísindi, er eitt heldur nýtt evni, ikki minst í Føroyum. So at siga var einki gjørt við hetta áðrenn 2004, men ferð er komin á, seinastu árini. Í 2002 varð eitt álit lagt fram um heildarpsykiatri, ið umfatar øll øki innan psykiatri.

Júst hetta er tað, ið hevur verið undir mest menning seinastu tíðina. Orsakað av tí at psykiatri var so lágt raðfest áðrenn, er týdningarmikið at ferð kemur á.

- Samstarvið millum psykiatriska depilin og landsins myndugleikar hevur verið framúrskarandi, sigur Hans Pauli Strøm í vi-ðmerking til greinar í Sosialinum í gjár um manglandi psykiatriviðgerð av børnum og ungum.

## Mest átrokandi

- Mest átrokandi var sosialpsykiatriin, greiðir hann frá. At fáa tey frísku út úr skipanini. Manglandi virknis- og bústaðarmøguleikar foraðu fyri hesum hjá teimum, ið vóru liðug við viðgerðina. Síðan hetta økið varð raðfest, eru ikki minni enn tvey sambýli komin, tað triðja letur upp í Havnini í vikuni. Rakstrarjáttanin til sosialpsykiatriina er vaksin síðan 2003, úr sjey milliónum, upp í tjúgu. Talið av starvsfólkum er eisini vaksið, úr 20 upp í 45.

Í nærmastu framtíð, verður farið undir at byggja enn fleiri bústaðarmøguleikar fyri sinnisveik.

Síðan var farið undir at menna økispskykiatriina, hetta arbeiðið varð eisini byrjað í 2004. Økispsykiatri umfatar viðgerðarmøguleikar og stuðul til sinnisveik, har tey búgva. Eitt økispsykiatriskt toymi er skipað á Landssjúkrahúsinum, og játtanin til hesa vaks fyrstu trý árini við 3,5 milliónum. Men enn er ikki komið á mál.

## Næsta stigið

Nú verður barna og ungdómspsykiatriin raðfest. Síðan 2007 hevur nógv verið gjørt við hesa og stór framstig eru farin fram síðan 2004. Millum annað er talið av børnum, ið eru í viðgerð hækkað úr 70 upp í 150.

Barna- og ungdómspsykiatri er sera nýggj, hon sá fyrst dagsins ljós í 2004, tá eitt toymi kom upp at standa á Landssjúkrahúsinum. Viðgerðin byggir á fakligan serkunnleika uttanifrá. Avtala og samstarv eru við danska sjúkrahúsið, Bispebjerg. Og eisini við ein privatan sálarfrøðing, ið av og á vitja í Føroyum.

- Tað er ikki av fíggjarligum orsøkum, at eingin barna- og ungdómssálarfrøðingur er í Føroyum, greiddi landsstýrismaðurin frá, - Tað hevði í roynd og veru verið bíligari enn núverandi loysnin. Trupulleikin er tann, í Føroyum sum aðra staðni, at hesir sálarfrøðingar ikki eru til at fáa fatur á.

Umstøðurnar eru ikki nøktandi á barna og ungdómspsykiatriska økinum í Føroyum, men tær eru nógv batnaðar. Játtanin til hetta økið var í 2007 hækkað við 0,8 milliónum og tað sama í 2008. Og síðan sjúkrarøkarfrøðingaskúlin flutti úr hølunum við Eirargarð, eru tey givin til barna- og ungdómssálarfrøði.

Men hóast umstøðurnar eru nógv mentar seinastu árini, er enn langt á mál, viðgekk landstýrismaðurin. Men ikki ber til at taka munnin ov fullan.

- Tað hevur verið full ferð á menningini og nú stendur barna- og ungdómspsykiatriin fyri tørni. At børn veksa upp við sálarligum trupulleikum, sum tað ikki verður tikið hond um, kemur at merkjast seinni í lívinum. Men síðan sálarfrøðin varð raðfest í Føroyum er nógv hent, og tað fer eisini at henda nógv innan barna- og ungdómssálarfrøði.



*Landsstýrismaðurin við heilsumálum, Hans Pauli Strøm, viðgongur, at psykiatritilboðini til børn og ung mugu mennast*

*Savnsmynd*

# Sálarliga fríur aftur

**Jenis av Rana varð í gjár fríkendur í landsrættinum. Málið, ið snúði um tagnarskyldu og fráboðanarskyldu hevur vart í tvey og eitt hálvt ár, og hendan fríkenningin var ikki tann fyrsta. Nú gleðist hann stórliga um avgerðina og sálarligu avlastingina**



RÆTTARMÁL

*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

- Prosessin er so møðandi, segði hann. Í trý ár hevur málið tyngt hann. Hann greiddi frá, at ótilvitað hevði hann isolerað seg sjálvan frá umheiminum og mistonkt fólk, fyri at hugsa ilt um seg. Hesa tíðina segði hann, seg hava mist svøvn og verið plágaður av eini óviljaðari hugsan um fólk. At málið nú endiliga var avgreitt var ein sannur lætti.

- Eitt tílíkt mál nemur við trúvirðið hjá tí rakta og tað svíður. Rættargongdin er so ræðandi, at ein dagur í rættinum má bara upplivast, tað ber ikki til at greiða frá tí. At sita har, meðan ákærin spillir teg út, er ræðuligt.

Stingirnir, ið hann upplivdi, fingu hann at ivast í avgerðini hjá dómsvaldinum. Hann segði seg næstan byrja at trúgva følsku ákærunum, tí tær vóru so nógvar og ógvusligar. Men tá avgerðin fall, kundi hann ikki annað, enn at takka fyri, at eitt rættvíst dómsvald hevur valdið.

## Gongdin

Tíðin, ið er ligin, síðan málið sá dagsins ljós hevur, fyri hansara viðkomandi rúmað ótrúliga nógvum óhugnaligum. Eftir eina avhoyring, ið vardi fimm tímar, segði løgreglumaðurin frá ferðaliðnum við hann,

- Dette er den værste gang pis, jeg nogensinde har hørt, og der er ikke noget kød på. Hann væntaði at málið fór at vera slept 14 dagar eftir sakin kom í rættar hendur, men so var ikki. Meir enn eitt hálvt ár seinni fekk hann tey tungu boð, at hann var ákærdur.

## Dyggur stuðul

Hóast hann hevur staðið í ringum ljósi í langa tíð, hevur hann havt gott fólk aftan fyri seg. Fólk, ið hava verið í viðgerð hjá honum, hava ikki skift lækna orsakað av tí og onnur rundan um hann hava verið við honum.

Nú, byrðan var lætt av honum, høvdu nógv fólk ynskt honum tillukku. Í gjár var veitsludagur seint út á kvøldið, segði hann glaður.